FFG – Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 29. september 2025

uvmr@uvmr.fo

Hoyringsvar til uppskot til ársroknskaparlóg v. m. – Mál. nr. 24/15584

Víst verður til skriv og teldupost tykkara 1. september 2024 við uppskoti til Ársroknskaparlóg (ÁRL) og uppskot til broytingar í Grannskoðaralógini (GL) og Vinnufelagslógini (VFL) v. m.

Nevndin í Felagnum Føroyskir Grannskoðarar (FFG) hevur gjøgnumgingið uppskotið til ársroknskaparlóg og broytingar til grannskoðaralógina, vinnufelagslógina o. a. og tekur nevndin yvirskipað undir við at dagføra Ársroknskaparlógina v. m. Tó hevur FFG hesar ítøkiligu viðmerkingar og tilmælir til broytingar til lógaruppskotið:

1.	Ad § 7,1,4	Tað eigur at verða nágreinað í viðmerkingunum, um ásetingin merkir at verandi almennu partafeløg eru at meta sum landspartafeløg, og harvið verða fevnd av ásetingunum í lógaruppskotinum um millum annað roknskaparflokk D og hálvársfrásøgn.
2.	Ad § 7,3,3	Í Føroyum finst eingin alment brúktur háttur fyri útrokning av miðaltal av ársverkum. Tí verður staðiliga heitt á Landsstýrisfólkið um, at fáa gjørt ein leist sum verður lýstur í kunngerð, samstundis sum lógin verður lýst. Um tað ikki er møguligt at áseta ein hóskandi hátt, so er tað ein møguleiki at seta miðaltal av ársverkum í leiðslufrágreiðingina ístaðin
3.	Ad § 26,1	Virðini í uppskotinum viðvíkjandi undantøk fyri smáfyritøkur skulu veraa umvent, nevniliga fíggjarjavni 2 mió.kr. og nettosøla 2,5 mió.kr. Vit mæla til at broyta ársverk til 12, so samsvar er við somu virðir í § 156, stk. 2.
4.	Ad § 32	Brúka "tíðaravmarkingar" ístaðin fyri tíðarskeiðsavmarkingarpostar.
5.	Ad § 39, 1&2	Brúka "felagskapital" ístaðin fyri fyritøkukapital, jb. § 39,3 sama heiti verður nýtt í vinnufelagslógini.
6.	Ad § 49,1	Manglar at nevna "kapitaláhugamál" sum eisini kunnu innroknast til innara virði. Mæla eisini til at nýta "atknýtt feløg" ístaðin fyri dótturfyritøkur"
7.	Ad § 49,7	Stk. 7 í § 49 eigur at vera eitt framhald av stk. 6
8.	Ad § 73,1,2	Brúka "ogn í umferð" ístaðin fyri umferðarognir.
9.	Ad § 74	Sí viðmerkingar til § 7,3,3 – mugu hava ein frymil fyri hvat eitt ársverk er.
10.	Ad § 95	Brúka "tíðaravmarkingar" ístaðin fyri tíðarskeiðsavmarkingarpostar.
11.	Ad § 156,2	Undantak í stk 2 ikki galdandi fyri fyritøkur við javna á 50 mió.kr. Uppskotið leggur upp til, at sama virði skal vera galdandi í FO sum í DK. Møguliga skuldi hetta verðið tillagað føroysk viðurskifti, soleiðis at markið verður nakað lægri enn 50 mió.kr.
12.	Ad § 156,2	Stk 2 kemur tvær ferðir fyri í greinini.

13. Ad § 162, 6 Landsstýrisfólkið má samstundis sum lógin kemur í gildi, áseta nærri reglur í kunngerð um á hvønn hátt "nettosølan" skal fráboðast til Skráseting Føroya.

14. Ad. Skjal 2

1. "Áogn til eigarar og leiðslu" ístaðin fyri "Áogn hjá fyritøkuluttakarum og leiðslu"
2. "Ikki inngoldin felagskapitalur" ístaðin fyri "Krav viðvíkjandi ikki inngoldnum" fyritøkukapitali og yvirkursi".
3. "Felagskapitalur" ístaðin fyri "fyritøkukapitalur"
4. "Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan felagskapital" ístaðin fyri "Tiltakspening fyri ikki inngoldnan fyritøkukapital og yvirkurs".
5. "Undangjald frá viðskiftafólki" ístaðin fyri "Móttikið undangjaldingar frá viðskiftafólkum."
6. "Onnur skuld" ístaðin fyri "Onnur skuld, heruppií skyldugur skattur og sosialar tryggingar o.a."
7. "Inntøkur frá kapitalpørtum í atknýttum og kapitaláhugamálum" ístaðin fyri "Inntøkur frá kapitalpartum í atknýttum og leysta atknýttum fyritøkur".

Nevndin hevur somuleiðis gjøgnumgingið uppskotið til fylgisbroytingar í grannskoðaralógini og vinnufelagslógini í sambandi við, at nýtt ársroknskaparlóg verður sett í gildi. Vit hava ongar viðmerkingar til fylgisbroytingarnar.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við FFG.

Vinarlig heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Fróði Sivertsen formaður	Olaf Frits Joensen næstformaður	Jóhannes Færø peningarøkil	Alvi S. S. Nielsen skrivari